Kappingareftirlitið

Annfinn V. Hansen, adv.
Undir Bryggjubakka 21
100 Tórshavn

**Tórshavn**, 23. mars 2021

**Mál. nr.:** 21/00176

**P/F M.T. Højgaard yvirtekur ræði á Sp/f RTS-Contractors**

Kappingareftirlitið fekk tann 11. mars 2020 fráboðan um, at P/F M.T. Højgaard hevði ætlanir um at yvirtaka meirilutan av partabrøvunum í Sp/f RTS-Contractors.

P/F M.T. Højgaard rekur virksemi innan byggismíð í Føroyum, og er partur av samtaki, sum rekur virksemi í fleiri londum. Sp/f RTS-Contractors rekur virksemi innanfyri jørð- og anlegsarbeiði bæði í Føroyum og uttanlands.

Talan er um yvirtøku sambært § 13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini, og tá umsetningurin hjá pørtunum er omanfyri í § 14, stk. 1, nr. 1 í kappingarlógini, skal Kappingareftirlitið taka støðu til yvirtøkuna.

Talan er um yvirtøku sambært § 3, stk. 1, litra c. í reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012, og er tí fráboðað eftir einføldum leisti.

Kappingareftirlitið hevur kannað yvirtøkuna og metir ikki, at yvirtøkan gevur orsøk til ivasemi. Kappingareftirlitið hevur tí tikið avgerð um at góðkenna yvirtøkuna, sambært § 15, stk. 5. í kappingarlógini.

Góðkenningin er treytað av at upplýsingarnar, sum fráboðari hevur latið Kappingareftirlitinum, eru rættar, sambært § 18a, stk. 3 í kappingarlógini.

Vegna Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Rúni J. Niclassen
fulltrúi

Skálatroð 20 · Boks 73 110 Tórshavn · Tlf.: +298 356040 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo